VÁGA KOMMUNA

# Gerðabók

# Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 20.04.2020 kl. 18:00 |
| **Fundarstaður:** | Miðvágs skúli |
| **Málnr.:** | 20/00006 |
| Til staðar: | Eyðdis Hartmann Niclasen, Rósa Samuelsen, Dagbjørn Hansen, Albert Ellefsen, Jens Gaardlykke, Heðin Poulsen, Jonhard Joensen, Jórun S. Haraldsen, Dánial Johansen, Jóhannis Joensen |
| Varalimir: | Tórdis Dam Johannessen |
| Ikki til staðar: | Dánjal Thomsen |
| Aðrir partar: | |
| Fundarskrivari: | Jóannes N. Dalsgaard |


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | | |
| 19/20 | 19/00683-12 | Umsókn um umbygging av matr. nr. 200a í Sandavági | 3 |
| 20/20 | 20/00026-6 | Umsókn um byggiloyvi til kvistar á matr. nr. 121b í Miðvági, Rygstún 6 | 4 |
| 21/20 | 20/00099-8 | Umsókn um byggiloyvi til umsitingarbygning á matr. nr. 375b í Sandavági | 6 |
| 22/20 | 20/00101-3 | Støðutakan til uppskot um framhaldandi rakstur av Listastovuni | 7 |
| 23/20 | 20/00117-5 | Støðutakan til tilmæli frá musiksskúlanevndini viðvíkjandi fígging av eftirútbúgving hjá leiðaranum v.m. | 8 |
| 24/20 | 20/00120-3 | Umsókn um byggiloyvi v.m. á matr. nr. 232d í Sandavági | 9 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 25/20 | 20/00132-3 | Støðutakan til umsókn frá Vága Judofelag um kr. 40.000,- í stuðuli at keypa nýggjar máttir fyri | 10 |
| 26/20 | 20/00147-3 | Støðutakan til umsókn frá Miðvágs Grót um at víðka um grótbrotið á Prestlandinum í Miðvági | 12 |
| 27/20 | 20/00238-1 | Støðutakan til uppskot frá borgarstjóranum um at endurrindað foreldragjaldið fyri kommunala barnaansing fyri tíðarskeiðið meðan kommunala barnaansingartilboðið hevur verið skert orsaka av verjutiltøkum móti COVID19 | 14 |
| 28/20 | 20/00179-4 | Umsókn frá Sandavágs bygdarsavni og Sandavágs fornminnafelag um stuðul til at gera eina heildarætlan fyri húsini hjá Suðuroyar Dánjali | 15 |
| 29/20 | 20/00183-3 | Jórun S Haraldsen býráðslimur leggur uppskot fyri býráðið um ábøtur á ferðslutrygdina ígjøgnum Miðvág og Sandavág | 16 |
| 30/20 | 20/00079-3 | Støðutakan til umsókn um stuðul til filmsverkætlan | 17 |
| 31/20 | 19/00568-3 | Borgarstjórin skjýtur upp, at kommunan biðjur HMP um at projektera útstykkingina á Heiðatrøðni soleiðis at arbeiðið kann bjóðast út á várið 2021 | 19 |
| 32/20 | 20/00146-4 | Umsókn frá SEV um loyvi at taka burtur verandi og til at byggja nýggja transformarastøð við Oyrargjógv | 20 |
| 33/20 | 20/00180-4 | Støðutakan til umsókn um at keypa planeraða grundstykkið matr. nr. 208k innaftur | 21 |
| 34/20 | 20/00221-3 | Eigararnir av matr. nr. 22o og 22p í Miðvági søkja um at keypa eina 30 cm breiða ál av Gerðisgøtu | 22 |
| 35/20 | 20/00225-2 | Støðutakan til, um býráði skal viðmæla umsókn frá Oyvør og Andreas Davidsen um marknaumskipan millum matr. 104a og 104b í Sandavági | 23 |
| 36/20 | 20/00249-3 | Úrslit av útbjóðing av útstykking eystanfyri Skaldaveg | 24 |
| 37/20 | 20/00213-1 | Yvirtøka av SÍF húsinum, matr.nr. 252b | 25 |

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

Til støðutakan

## 19/20 Umsókn um umbygging av metr. nr. 200a í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 06.03.2020 | 17/20 |
| 2 Býráðið | 20.04.2020 | 19/20 |

**Málslýsing:**

Eigarin av matr. nr. 200a í Sandavági søkir um loyvi at umbyggja og byggja tilbygning, sum er 10,3 $m^2$ afturat húsum sínum á Sondum 3 í Sandavági.

HMP hevur byggimálsviðgjørt umsóknina og hava teir viðmælt at geva loyvi við fráviki.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**

Av tí at verandi hús standa í mark móti vegnum, er neyðugt at byggivaldið gevur loyvi til at klæðing, ið verður løgd uttan á verandi kemur umleið 140 mm út um mark.

Eisini er ætlanin at gera eina lítla altan á kvistin móti vegnum, hendan kemur at hanga út um mark. Tí má frávik gevast í hesum føri eisini.

**Tekniska nevnd 06. marts 2020:**
**Avgerð:**

Viðmælt at geva byggiloyvi, tó verður frámælt at geva loyvi til altan móti vegnum.

**Býráðið 20. april 2020:**
**Avgerð:**

Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd.

Formansváttan:_____________

## 20/20 Umsókn um byggiloyvi til kvistar á matr. nr. 121b í Miðvági, Rygstún 6

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 06.03.2020 | 18/20 |
| 2 Býráðið | 20.04.2020 | 20/20 |

**Málslýsing:**

Áki H Hansen søkir um byggiloyvi til kvistar og afturatbygging av húsunum á matr. nr. 121b í Miðvági.

Vága kommuna hevur fyrr givið byggiloyvi til at lyfta yvirtromina av húsunum upp.

Hetta var gjørt við at víkja frá kravinum um mest loyvda nýtslustig í byggisamtyktini fyri Vága kommunu.

Um húsini verða longd norðureftir við 2,20 m, koma tey at standa í mark móti matr. nr. 177b, sum umsøkjarin eigur. Eisini koma tey at standa umleið 0,30 m frá markinum til matr. nr. 199.

Viðlagt umsóknini er undirskrivað loyvi frá eigaranum av matr. nr. 119, til at byggja nærri marki enn kravi er í byggisamtyktini.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**

Húsini, sum tey standa í dag hava eitt nýtslustig á 0,75. Eftir møguliga um- og tilbygging verður nýtslustigi 1,06. *( Hetta er útrokning gjørd eftir teimum tekningum, ið liggja við umsóknini*) Hetta er meir enn tvífalt so nógv, sum byggisamtyktin fyri Vága kommunu loyvir.

Fráleikin til grannamark er eisini ímóti byggisamtyktini fyri Vága kommunu. Krav til fráleika til grannamark er eisini galdandi, tá umsøkjari er eigari av grannaogn.

**Tekniska nevnd 06. marts 2020:**
**Avgerð:**

Viðmælt at geva loyvi at byggja uppí húsini við tí treyt, at matr. Nr. 177b og 121b verða løgd saman í ein matrikul.

Frámælt verður at geva byggiloyvi til kvistar.

Formansváttan:____________

**<u>Býráðið 20. april 2020:</u>**
**Avgerð:**

Samtykt at beina málið aftur í teknisku nevnd, sum skal biða serfrøðing í byggisiði gera fagurfrøðiliga meting av umsóknini við atliti til at varðveita dámin í býlinginum á Ryggi.

Jóhannis Joensen mælir til at geva loyvi soleiðis sum søkt er um.

Formansváttan:____________

# 21/20 Umsókn um byggiloyvi til umsitingarbygning á matr. nr. 375b í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 06.03.2020 | 19/20 |
| 2 Býráðið | 20.04.2020 | 21/20 |

**Málslýsing:**

Teknistovan Gøta Sp/f søkir vegna Luna um byggiloyvi til skrivstovubygning á matr. nr. 375b í Sandavági.

HMP hevur gjørt byggimálsviðgerðina, og høvdu teir bert smávegis viðmerkingar til innsenda prosjekttilfari.

Prosjekttilfari er rættað og hevur HMP nú bert tað viðmerking, at pláss skal gerast uttan fyri bygningin, sum verður avsett til sløkkiliðsbil at standa á um eldur er í.

Umsitingin hevur ongar viðmerkingar til umsóknina.

**Tekniska nevnd 06. marts 2020:**
**Avgerð:**

Viðmælt at geva byggiloyvi.

**Býráðið 20. april 2020:**
**Avgerð:**

Samtykt at geva byggiloyvi.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 22/20 Støðutakan til uppskot um framhaldandi rakstur av Listastovuni

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 05.03.2020 | 17/20 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.03.2020 | 15/20 |
| 3 Býráðið | 20.04.2020 | 22/20 |

**Málslýsing:**

Sølvi Símunarson hevur latið borgarstjóranum og formanninum í mentunar- og trivnaðarnevndini eina frágreiðing um virksemi í Listastovuni í Miðvági og umframt nakrar tankar um, hvussu raksturin av Listastovuni kann fáast í eina fíggjarliga trygga legu.

Borgarstjórin ynskir, at nevndin viðgerð frágreiðingina.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 05. marts 2020:**
**Avgerð:**

Nevndin mælir til at játta nevndini fyri Listastovuni 10.000 kr í rakstrarstuðli í 2020.

**Fíggjarnevndin 12. marts 2020:**
**Avgerð:**

Mælt verður til at taka undir við tilmælinum hjá mentunar- og trivnaðarnevndini

**Býráðið 20. april 2020:**
**Avgerð:**

Samtykt at taka undir við mentunar- og trivnaðarnevndini.

Formansváttan:____________

# 23/20 Støðutakan til tilmæli frá musiksskúlanevndini viðvíkjandi fígging av eftirútbúgving hjá leiðaranum v.m.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 05.03.2020 | 18/20 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.03.2020 | 16/20 |
| 3 Býráðið | 20.04.2020 | 23/20 |

## Málslýsing:

Nevndin fyri Musikkskúlan í Vágum mælir í skrivi dagfest 07.02.2020 kommununum í Vágum til at játtað kr. 28.500 til at fíggja eftirútbúgving hjá musikkskúlaleiðaranum.

Víðari mælir nevndin til, at kommunurnar yvirtaka innkrevjing og umsiting av næmingagjaldinum til Musikkskúlan og at játtanin til Musikkskúlan verður hækkað við eini upphædd, svarandi til næmingagjaldið.

Sørvágs kommuna hevur í skrivi sent Vága kommunu 03.03.2020 boðað frá, at Sørvágs bygdarrráð hevur samtykt at rinda sín lutfalsliga part av eftirútbúgvingarkostnaðinum, treytað av at Vága kommuna rindar restina. Eisini hevur Sørvágs bygdarráð samtykt at taka undir við tilmælinum frá musikkskúlanevndini um at kommunurnar skulu yvirtaka innkrevjing og umsiting av næmingagjaldinum.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 05. marts 2020:**
**Avgerð:**

Nevndin mælir til at Vága kommuna rindar sín part av kostnaðinum fyri leiðsluútbúgvingina og at kommunurnar yvirtaka innkrevjing og umsiting av næmingagjaldinum.

**Fíggjarnevndin 12. marts 2020:**
**Avgerð:**

Mælt verður til at taka undir við mentanar- og trivnaðarnevndin

**Býráðið 20. april 2020:**
**Avgerð:**

Samtykt at taka undir við mentunar- og trivnaðarnevndini.

## 24/20 Umsókn um byggiloyvi v.m. á matr. nr. 232d í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 06.03.2020 | 21/20 |
| 2 Býráðið | 20.04.2020 | 24/20 |

**Málslýsing:**

Jan Erik Simonsen søkir um byggiloyvi og loyvi til at grava omanfyri húsini á Sondum 35 í Sandavági.

Ætlanin er at byggja dur, sum er 2,00 x 5,00 m afturat húsunum. Eisini er ætlanin at gera nýggja trappu.

Eisini verður søkt um loyvi at grava økið upp omanfyri húsini fyri at fáa drenað vatn úr stykkinum. Ætlanin er at hetta økið skal brúkast til parkeringspláss.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**

Umsitingin hevur kannað umsóknina og hevur bert tað viðmerking at byggingin kemur nærri grannamarki enn kravdu 2,50 m.

Hetta metir umsitingin ikki verða nakran trupuleika, tí tað vil ikki økja um vandan fyri eldi.

Húsini í økinum standa flest øll nærri marki, enn kravt verður í byggisamtyktini.

**Tekniska nevnd 06. marts 2020:**
**Avgerð:**

Viðmælt.

**Býráðið 20. april 2020:**

Borgarstjórin kunnaði býráðslimirnar um, at kommunan d.d. hevur móttikið grannaloyvi frá eigaranum av matr. nr. 40d í Sandavági.

**Avgerð:**

Samtykt at ganga umsóknini á møti.

Formansváttan:____________

## 25/20 Støðutakan til umsókn frá Vága Judofelag um kr. 40.000,- í stuðuli at keypa nýggjar máttir fyri

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 05.03.2020 | 19/20 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.03.2020 | 17/20 |
| 3 Býráðið | 20.04.2020 | 25/20 |

**Málslýsing:**

Hendrik Johannesen og Rene W. Joensen søkja, vegna Vága Judofelag, um kr. 40.000 í stuðuli til at keypa máttir fyri.

Teir greiða frá, at Vága Judofelag er eitt felag í menning. Tey eru í dag umleið 30 íðkandi limir.

Tey venja á gomlum máttum, sum tey hava fingið frá Havnar Judofelag.

Viðmerking frá umsitingini:

Í dag eru kr. 2.000,- eftir av játtanini til stuðul til ítrótt.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 05. marts 2020:**
**Avgerð:**

Mælt verður til ikki at játta stuðul.

Mælt verður til at kommunan keypir máttir, sum Vága Judofelag kann brúka; mælt verður til at býta íløguna í tvey yvir 2020 og 2021 um hetta letur seg gera.

Mælt verður til at Vága Judofelag framyvir kemur inn í leistin fyri stuðul til ítrótt við kr. 8.000 um árið. Stuðulin verður útgoldin móti umsókn.

**Fíggjarnevndin 12. marts 2020:**
**Avgerð:**

Mælt verður til at taka undir við mentanar- og trivnaðarnevndini.
Útreiðslan verður fíggjað við eykajáttan.

Formansváttan:____________

**<u>Býráðið 20. april 2020:</u>**
**Avgerð:**

Samtykt at taka undir við tilmælunum hjá mentunar- og trivnaðarnevndini og fíggjarnevndini.

Formansváttan:____________

## 26/20 Støðutakan til umsókn frá Miðvágs Grót um at víðka um grótbrotið á Prestlandinum í Miðvági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 02.03.2020 | 6/20 |
| 2 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 05.03.2020 | 20/20 |
| 3 Fíggjarnevndin | 12.03.2020 | 18/20 |
| 4 Býráðið | 20.04.2020 | 26/20 |

**Málslýsing:**

Miðvágs Grót søkir um, at kommunan gevur loyvi til, at økið, har loyvt er at spreingja sambært sáttmálanum frá 19. juli 2019, verður víðkað 410 fermetrum, sum teknað við svørtum niðanfyri:



Mett verður, at økið gevur umleið 7.380m$^3$ av gróti.

Eisini vísa teir á, at kommunan fær meira uppland við at geva loyvi.

**Vinnu- og havnanevndin 02. marts 2020:**
**Avgerð:**

Meirilutin mælir til at játta umsóknini treytað av at nýggja beni fylgir fluktini á verandi beni.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 05. marts 2020:**
**Avgerð:**

Mælt verður frá at ganga umsóknini á møti.

Formansváttan:____________

**Fíggjarnevndin 12. marts 2020:**
**Avgerð:**

Mælt verður til at taka undir við mentanar- og trivnaðarnevndini

**Býráðið 20. april 2020:**

Borgarstjórin kunnaði býráðslimirnar um at Vága kommuna d.d. hevur móttikið mótmæli frá eigaranum av matr. nr. 57l í Miðvági, móti at geva loyvi til at víðka grótbrotið.

**Avgerð:**

Samtykt at sýta umsóknini.

Dánial Johansen var fyri at ganga umsóknini á møti.

Formansváttan:____________

**<u>27/20 Støðutakan til uppskot frá borgarstjóranum um at endurrindað foreldragjaldið fyri kommunala barnaansing fyri tíðarskeiðið meðan kommunala barnaansingartilboðið hevur verið skert orsaka av verjutiltøkum móti COVID19</u>**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 20.04.2020 | 27/20 |

**<u>Málslýsing:</u>**

Borgarstjórin skjýtur upp, at kommunan endurrindar foreldrum goldið foreldragjald fyri ansingartilboð á dagstovnum og frítíðarskúla í Vága kommunu fyri tíðarskeiðið 16.03.2020 – 17.04.2020 tá kommunala barnaansingartilboðið hevur verið skert orsaka av verjutiltøkum móti COVID19.

**<u>Býráðið 20. april 2020:</u>**
**Avgerð:**

Samtykt at rinda øllum, sum hava rindað ansingargjald til kommunalu barnaansingina í Vága kommunu í nevnda tíðarskeiði, ansingargjaldið aftur.

Upphæddin, sum er kr. 356.000, verður at fíggja við eykaætlan.

Formansváttan:____________

# 28/20 Umsókn frá Sandavágs bygdarsavni og Sandavágs fornminnafelag um stuðul til at gera eina heildarætlan fyri húsini hjá Suðuroyar Dánjali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 12.03.2020 | 20/20 |
| 2 Býráðið | 20.04.2020 | 28/20 |

**Málslýsing:**

Rósa Samuelsen hevur, vegna Sandavágs bygdarsavn, í skrivi dagfest 01.03.2020 søkt Vága kommunu um 25.000 kr. í stuðli til at gera eina heildarætlan fyri 'húsini hjá Suðuroyar Dánjali'.

**Fíggjarnevndin 12. marts 2020:**
**Avgerð:**

Viðmælt at játta ein stuðul uppá kr. 25.000,-

**Býráðið 20. april 2020:**
**Avgerð:**

Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

Formansváttan:____________

# 29/20 Jórun S Haraldsen býráðslimur leggur uppskot fyri býráðið um ábøtur á ferðslutrygdina ígjøgnum Miðvág og Sandavág

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 06.03.2020 | 22/20 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.03.2020 | 19/20 |
| 3 Býráðið | 20.04.2020 | 29/20 |

**Málslýsing:**

Jórun S. Haraldsen hevur lagt uppskot fyri býráðið, um at gera ábøtur á ferðslutrygdina ígjøgnum Miðvág og Sandavág.

1. Umvæla og dagføra gonguteigar á Leitisvegi við kirkjuna og á Jatnavegi við omankoyringina til Heimarubryggju.
2. Umvæla og mála bungurnar, sum eru ímillum hesar gonguteigar.
3. Gera nýggjan gonguteig og seta ljós upp við Ungdómshúsið.
4. Heita á Landsverk um at dagføra og mála gonguteigarnar í Sandavági.
5. Heita á Landsverk um at gera nýggjan gonguteig á Leitisvegi, har sum matstovan Smiðjan er.
6. Heita á Landsverk um at seta tveir ferðmátarar upp. Ein á Leitisveg heim ímóti Bónus og ein á Jatnavegi uml. har, sum landsvegurin endar.

**Tekniska nevnd 06. marts 2020:**
**Avgerð:**

Viðmælt.

**Fíggjarnevndin 12. marts 2020:**
**Avgerð:**

Viðmælt.

**Býráðið 20. april 2020:**
**Avgerð:**

Samtykt at taka undir við uppskotinum.

Formansváttan:____________

## 30/20 Støðutakan til umsókn um stuðul til filmsverkætlan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 05.02.2020 | 10/20 |
| 2 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 05.03.2020 | 16/20 |
| 3 Fíggjarnevndin | 12.03.2020 | 14/20 |
| 4 Býráðið | 20.04.2020 | 30/20 |

**Málslýsing:**

Rannvá Jónsdóttir søkir í skrivi dagfest 23.01.2020 Vága kommunu um stuðul til filmsverkætlanina 'Faðir mín Faðir', sum Julia í Kálvalíð skal leikstjórna. Filmurin verður, sambært umsóknini, tikin upp í Vágum í 2020.

Søkt verður ikki um ávísa upphædd.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**

Í fíggjarætlanini 2020 eru avsettar 780 tkr. til stuðul til mentan. Av hesum eru 400 tkr. markaðar til standmynd av Seyðamanninum á Sondum og býráðið hevur higartil játtað umsóknum fyri íalt 240 tkr. til onnur endamál. Tøka játtanin er sostatt 150 tkr.

| ***Konto 5.24.14: Stuðul til ítróttar- og mentanarendamál,***<br>***Undirkonto 20: Stuðul til mentan*** | |
|---|---|
| *FÆ2020* | *780.000 kr* |
| *Bundið, játtað og brúkt higartil* | *629.200 kr* |
| *Tøk játtan* | *150.800 kr* |

Í *Reglugerð fyri viðgerð og avgreiðslu av umsóknum til kommununa um fíggjarligan stuðul frá feløgum og einstaklingum til mentan og ítrótt frá 25.11.2019* er eingin heimild til at veita stuðul til einstaklingar ella til einstaka verkætlanir. Umsitingin mælir tí til, at nevndin ummælir umsóknina, sum síðani verður løgd fyri býráðsfund til endaliga støðutakan.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 05. februar 2020:**
**Avgerð:**

Samtykt at bjóða umsøkjaranum at greiða nevndini frá verkætlanini á komandi fundi áðrenn avgerð verður tikin.

Formansváttan:____________

**<u>Mentunar- og trivnaðarnevndin 05. marts 2020:</u>**

Umsøkjararnir vóru á fundi og greiddu frá verkætlanini. Tær nevndu eina stuðulsupphædd á 50.000 kr. Harumframt ynsktu tær at fáa ein kontaktpersón hjá kommununi at brúka í sambandi við tekniskar/praktir avbjóðingar í sambandi við upptøkurnar. Eisini høvdu tær ynski um at fáa hølir (ein basa) og catering.

**Avgerð:**

Mælt verður til at játta 40.000 kr. til verkætlanina umframt at veita hølir, catering og praktiska hjálp, tó soleiðis at samlaði stuðulin ikki kostar kommununi meira enn 50.000 kr.

**<u>Fíggjarnevndin 12. marts 2020:</u>**
**Avgerð:**

Mælt verður til at taka undir við tilmælinum hjá mentunar- og trivnaðarnevndini

**<u>Býráðið 20. april 2020:</u>**
**Avgerð:**

Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanar- og trivnaðarnevndini.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 31/20 Borgarstjórin skjýtur upp, at kommunan biðjur HMP um at projektera útstykkingina á Heiðatrøðni soleiðis at arbeiðið kann bjóðast út á várið 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 17.04.2020 | 25/20 |
| 2 Býráðið | 20.04.2020 | 31/20 |

**Málslýsing:**

Borgarstjórin skjýtur upp, at býráðið samtykkir, at kommunan beinanvegin biðjur HMP um at fara undir prosjektering av arbeiðinum at gera útstykkinging á Heiðatrøðni í Miðvági, soleiðis at arbeiðið kann bjóðast út komandi vár.

Býráðið samtykti á fundi tann 16. desember 2019, at kommunan skuldi fara í samráðingar við eigararnar um keyp av lendinum. Eigararnir hava nú játtað at selja kommununi umbidna lendið fyri kr. 89,- pr. fermetur. Umhvørvisstovan hevur býtt stykkini frá restini av matriklunum. Umsitingin arbeiðir í løtuni við at skriva ognarbrøvini, sum síðani skulu skrivast undir og sendast til tinglýsingar.

**Tekniska nevnd 17. april 2020:**
**Avgerð:**

Viðmælt.

**Býráðið 20. april 2020:**
**Avgerð:**

Samtykt at taka undir uppskotinum.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

# 32/20 Umsókn frá SEV um loyvi at taka burtur verandi og til at byggja nýggja transformarastøð við Oyrargjógv

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 17.04.2020 | 29/20 |
| 2 Býráðið | 20.04.2020 | 32/20 |

**Málslýsing:**

Í sambandi við royndarverkætlan við sjóvarfalsorku søkir Sev um loyvi at taka verandi trafostøð nr.690 við Oyrargjógv burtur.

Í øðrum lagi søkja teir um loyvi at byggja nýggja trafostøð á øðrum stað í sama øki.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**

Sambært viðtøkurnar hjá SEV hava kommunurnar skyldu til at útvega SEV lendi at byggja trafostøðir á. Hetta hevur vanliga verði loyst við at kommunan keypir ella leigar lendi til at byggja á.

**Tekniska nevnd 17. april 2020:**
**Avgerð:**

Viðmælt.

**Býráðið 20. april 2020:**
**Avgerð:**

Samtykt at ganga umsóknini á møti.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 33/20 Støðutakan til umsókn um at keypa planeraða grundstykkið matr. nr. 208k innaftur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 17.04.2020 | 31/20 |
| 2 Býráðið | 20.04.2020 | 33/20 |

**Málslýsing:**
Poul Kjartan og Diana Kongsbak heita á kommununa um at keypa grundstykki matr. Nr. 208k í Miðvági innaftur.
Grundstykkið er planerað og hol er borað til jarðhita.
Tey hava havt hesar útreiðslur av stykkinum:

| | |
|---|---|
| Grundstykki | kr. 144.600,- |
| Planering | kr. 275.000,- |
| Hol til jarðhita | kr. 77.956,50 |
| Tilsamans | kr. 497.556,50 |

**Tekniska nevnd 17. april 2020:**
**Avgerð:**

Mælt verður til at loyva eigaranum at selja stykkið í fríðari sølu. Grundað á at kommunan metir ikki at hon kann selja stykkið víðari fyri upplýsta prís.

**Býráðið 20. april 2020:**
**Avgerð:**

Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Formansváttan:____________

## 34/20 Eigararnir av matr. nr. 22o og 22p í Miðvági søkja um at keypa eina 30 cm breiða ál av Gerðisgøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 17.04.2020 | 34/20 |
| 2 Býráðið | 20.04.2020 | 34/20 |

**Málslýsing:**

Johnni Poulsen og Sigtór Petersen søkja um loyvi at keypa eina 30 cm breiða ál av Gerðisgøtu.

Orsøkin til umsóknina er at Johnni Poulsen ætlar at laða ein garð móti vegnum, men stóra grótið hann hevur lagt frammanfyri sínari niðankoyring, kemur ov langt út móti vegnum, so tað ber ikki til at laða uttaná.

Johnni Poulsen sigur at um hann ikki fær loyvi at keypa álina sleppur hann ætlanini um at laða garðin.

Orsøkin til at Sigtór Petersen eisini søkir um at fáa loyvitil at keypa eina ál er, at teir báðir meta at tað hevði tikið seg betur út, um matriklarnir ganga í somu linju yvir til parkeringsplássið.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**

Tað er útlagt til veg í 8 metur breidd framman fyri matr. nr. 22o og 22p, men longur vesturi framman fyri matr. nr. 309c og 309l er lagt til veg í 5,60 metur breidd.

Almenna byggisamtyktin fyri Vága kommunu sigur at lagt skal verða út fyri vegi í 8 metur breidd um vegurin gongur til øki við meira enn 5 grundstykkjum.

Umsitingin metir ikki at tað fer at hava nakran týdning fyri vegaføringina um umsøkjararnir fáa loyvi at keypa 30 cm av Gerðisgøtu, tí vegurin er nógv smælri en tað longur vesturi, har ferðslan kemur inn í økið.

**Tekniska nevnd 17. april 2020:**
**Avgerð:**

Viðmælt at selja.

**Býráðið 20. april 2020:**
**Avgerð:**

Samtykt at ganga umsókni á møti. Albert Ellefsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

# 35/20 Støðutakan til, um býráði skal viðmæla umsókn frá Oyvør og Andreas Davidsen um marknaumskipan millum matr. 104a og 104b í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 17.04.2020 | 35/20 |
| 2 Býráðið | 20.04.2020 | 35/20 |

**Málslýsing:**

Umhvørvisstovan hevur sent býráðnum umsókn frá Oyvør og Andreas Davidsen um marknaumskipan millum matr. nr. 104a og 104b í Sandavági til ummælis.
Umsøkjararnir søkja um, at matr. nr. 104a letur 23$m^2$ til matr. nr. 104b.
Ætlanin er at nýta økið til innkoyring til matr. nr. 104b.
Víddin á matr. nr. 104a er í dag 187 $m^2$, meðan víddin á matr. nr. 104b er 274 $m^2$.

**Tekniska nevnd 17. april 2020:**
**Avgerð:**

Viðmælt.

**Býráðið 20. april 2020:**
**Avgerð:**

Samtykt at viðmæla umsókníni.

VÁGA KOMMUNA

# 36/20 Úrslit av útbjóðing av útstykking eystanfyri Skaldaveg

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 17.04.2020 | 41/20 |
| 2 Býráðið | 20.04.2020 | 36/20 |

**Málslýsing:**

Býráðið samtykti 24.02.2020 at bjóða arbeiði at gera útstykkingina út.

Eftir boðum frá borgarstjóranum var arbeiði boði út, sum undirhondsboð til Sp/f Desk og Erhard Dam.

Licitatión var mánadagin 30. mars. Og úrslitið var:

- Sp/f Desk Kr. 3.755.067,75
- Erhard Dam Kr. 4.761.653,64

Metingin, sum ráðgevararnir gjørdu var Kr. 3.500.000,-

**Tekniska nevnd 17. april 2020:**
**Avgerð:**

Viðmæla at taka av lægra tilboðum. Dánial Johansen luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

**Býráðið 20. april 2020:**
**Avgerð:**

Samtykt at taka av tilboðnum frá sp/f Desk.

Dánial Johansen luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

# 37/20 Yvirtøka av SÌF húsinum, matr.nr. 252b í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 12.03.2020 | 22/20 |
| 2 Býráðið | 20.04.2020 | 37/20 |

**Málslýsing:**

Borgarstjórin biður býráðið taka støðu til áheitan frá SÍF um at kommunan keypir SÌF húsið, matr.nr. 252b, fyri kr. 1.200.000,-
Í býtishandlinum er umframt avtala, at kommunan letur SÌF, garaguna á Loftagrund, matr.nr. 150d, + kr. 150.000,- til dagføring av garaguni.

**Fíggjarnevndin 12. marts 2020:**
**Avgerð:**

Mælt verður til at kommunan keypir SÌF húsið og letur garaguna á Loftagrund, umframt eina upphædd upp til kr. 150.000,- til dagføring av garaguni.
Samlaða upphæddin, kr. 1.350.000,- verður fíggjað við eykajáttan.

**Býráðið 20. april 2020:**
**Avgerð:**

Samtykt at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

Fundurin lokin kl. 20:32

______________________________
Eyðdis Hartmann Niclasen

______________________________
Rósa Samuelsen

______________________________
Dagbjørn Hansen

______________________________
Albert Ellefsen

______________________________
Jens Gaardlykke

______________________________
Heðin Poulsen

______________________________
Tórdis Dam Johannessen

______________________________
Jonhard Joensen

______________________________
Jórun S. Haraldsen

______________________________
Dánial Johansen

______________________________
Jóhannis Joensen